**LANDSROYND 4. FLOKKUR**
**MAI 2009**

Føroyskt, lesa og skilja tekst

# FØROYSKT

**45 minuttir**



Myndin er frá www.skulin.fo.

| Navn: | Flokkur: |
| --- | --- |
| Skúli: | Lærari: |

Svarini verða skrivað á uppgávuarkið. Byrjað verður við fyrstu uppgávu á síðu 2, og síðani verða uppgávurnar loystar í teirri raðfylgju, tær koma. Tú kanst skriva við blýanti.

# Set X við røttu myndina

**abbi**

   

**barnavognur**

   

**dukka**

   

**epli**

   

**floyta**

   

**grýla**

   

**hosa**

   


**inniskógvur**

   

**ílat**

   

**jarðber**

   

**kvísl**

   

**lundi**

   

**maðkur**

   

**noða**

   

**ostur**

   

**ósi**

   

**prentari**




 

**rullupylsa**

   

**spaki**

   

**trantur**

   


**upsi**

   

**oyggj**

   

**vaskimaskina**

   


**úlvur**

   

# Set X við røttu myndina

1. **Gentan er ljóshærd**

   **Hon er ikki í brillum**

   **Hon hevur ikki flættur**

   **Hon hevur stutt hár**

**Her eru 5 gentur:**



2. **Drongurin er ikki í brillum**

   **Hann er ikki á myndini uttast til vinstru**

   **Heldur ikki næstuttast til høgru**

   **Hann er í húgvu**

**Her eru 5 dreingir:**



3. **Maðurin hevur ikki skegg**

**Hann er ikki í brillum**

**Hann er ikki á mittastu myndini**

**Hann er ikki í húgvu**

**Her eru 5 menn:**



4. **Gentan er í kjóla**

**Kjólin er myrkur**

**Gentan hevur ikki purlut hár**

**Hon hevur tasku í hondini**

**Her eru 5 gentur:**



# Set X við røttu myndina

5. **Konan hevur tasku**

**Konan er ljóshærd**

**Hon er ikki í kjóla**

**Hon er ikki hattleys**

**Her eru 5 konur:**



## Hvat orð hoyrir ikki við her?
## Set ring um rætta svarið og skriva tað á reglurnar

borð – stólur – sofa – skáp – bóltur – spegil ______________________

mamma – pápi – omma – abbi – hond – barn ______________________

breyð – mjólk – stólur – smør – pylsa – ísur ______________________

regn – vindur – sól – vika – kavi – æl ______________________

hamari – lineal – sag – klípitong – dunna – pennur ________________

illur – glað – barn – súrur – kedd – blíð ________________________

sova – eta – liggja – hestur – renna – svimja ____________________

sjónvarp – song – video – telda – telefon – radio ________________

sólja – smæra – snigil – summardái – reinfan – mækja ______________

leyva – tikari – leopardur – fílur – kenguru – ketta ________________

## Set kross í rætta puntin

-Í dag fara vit í skúlakøkin at baka, sigur Hans. Hann er flokslærari hjá fjórða flokki. Bárður, sum gongur í flokkinum,  heldur, at Hans er ein sera góður lærari. Tey hava hann í føroyskum og kristni, men ofta finnur hann upp á okkurt annað at gera, sum nú í dag. Hans hevur eisini lovað flokkinum, at tey skulu fara ein túr til Nólsoyar í summar.
Tá ið tey koma í køkin, verða tey býtt í bólkar. Bárður er í bólki við Sáru, Anniku og Finni. Hans hevur longu verið og keypt, so alt tilfarið er klárt. Tey skulu baka bollar.

| | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Bárður er flokslærari í fjórða flokki | | |
| Tey fara í skúlakøkin | | |
| Bárður er í bólki við Sáru, Anniku og Hans | | |
| Finnur er í bólki við Sáru,  Anniku og Bárði | | |
| Tey fara at baka bollar | | |

Í køkinum gongur væl í fyrstani. Fyrst viga tey tilfarið og koyra alt í eitt fat, og so fara tey at elta bollarnar. Tey skiftast um. Bárður og Annika gerast eitt sindur ósamd, tí Annika heldur, at Bárður vil elta ov leingi, so hon ikki sleppur framat. Hon tekur í fatið og roynir at rykkja tað av Bárði, men hvat hendir? Fatið dettur á gólv, og alt deiggið fer út um gólvið. Bárður er um at gráta. Hann hyggur upp á hini, og hann sær, hvussu ill Finnur og Sára eru. Tað er eisini teirra deiggj! Annika rópar hart eftir Hansi, hon sigur, at Bárður hevur alla skyldina. Hann vil elta alla tíðina. Hans hevur kortini sæð og hoyrt, hvussu tey hava skeldast, so hann er eisini eitt sindur illur við tey bæði. Kortini hjálpir hann teimum at viga mjøl til nýtt deiggj, og hann fer ikki frá teimum aftur, fyrr enn tey hava fingið deiggið saman aftur og tikið tað gamla upp av gólvinum. Annika sigur, at tey hava hønur, so hon kann taka tað gamla deiggið við heim til hønurnar. Bollarnir verða fínir, og tey fáa átta bollar í part.

| | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Bárður og Sára fara at skeldast | | |
| Annika og tey hava hønur | | |
| Hans hjálpir teimum at viga mjøl | | |

## Set kross í rætta puntin

| | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Fatið við deigginum dettur á gólv | | |
| Sára rópar eftir Hansi | | |
| Tey fáa átjan bollar í part | | |
| Tá ið tú bakar bollar, mást tú lata mjøl í deiggið | | |

Tá ið Bárður fer heim aftan á skúlatíð, hevur hann ein posa við bollum við sær. Hann gleðir seg at bjóða Óla frá sær. Óli er beiggi Bárð. Teir eru ofta einsamallir heima seinnapartin, tí mamma og pápi koma ikki heim fyrr enn klokkan fimm. Bárður er glaður um at hava ein stóran beiggja, Óli er 14 ár, og hóast hann er fýra ár eldri enn Bárður, so stuttleika teir sær saman. Ofta lesa teir uppá saman, og Óli hjálpir Bárði, um tað er okkurt, sum Bárður ikki dugir at gera.

Óli er ikki komin, tá ið Bárður kemur heim, so Bárður skundar sær at borðreiða við bollum, smøri og osti.  Óli kemur eina løtu seinni, og hann er glaður at fáa nýbakaðar bollar. Óli hevur lænt ein film frá einari gentu í sínum flokki, og tá ið teir eru lidnir at eta, seta teir seg at hyggja eftir filminum.

## Set kross í rætta puntin

| | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Bárður er tann yngri av beiggjunum | | |
| Beiggi Bárð eitur Ólavur | | |
| Óli fer at borðreiða, tá ið hann kemur heim | | |
| Óli hevur lænt ein film | | |
| Ein genta í flokkinum hjá Bárði eigur filmin | | |
| Foreldrini koma heim klokkan 17.00 | | |
| Óli er fjúrtan ára gamal | | |
| Bárður hjálpir ofta Óla við skúlaarbeiðinum | | |
| Óli hjálpir ofta Bárði við skúlaarbeiðinum | | |
| Bárður setir bollar, ost og smør á borðið | | |

Tá ið mamma og pápi koma heim, fara øll fýra at gera døgurða. Óli borðreiðir, mamma flysur epli, og pápi og Bárður gera frikadellur. Tá ið tey hava etið, fer Bárður at lesa uppá. Hann hevur bæði enskt at lesa og danskar uppgávur at loysa. Í enskum lesur hann um Mandy. Tað er ein genta, sum býr í Onglandi, men hon er komin til Føroya at vitja familjuna hjá sær. Bókin fortelur um mangt ymiskt, sum Mandy upplivir í Føroyum. Hon er á ólavsøku, hon hoyggjar, og hon sær eisini eitt grindadráp. Bárði dámar væl enskt, og hann dugir eisini nógv ensk orð.

-Pápi, veitst tú, hvussu spik eitur á enskum? spyr Bárður.

-Tað havi eg gloymt, svarar pápi.

-Tað eitur blubber, sigur Bárður. -Tað stendur her í Mandy-bókini.

Bárður biður Óla hjálpa sær við donskum. Hann skal finna umsøgn og grundlið og seta komma í eina søgu.

Bárður heldur, at tað er eitt sindur trupult at skilja, men Óli hevur gott tol at hjálpa honum.

-Umsøgnin er altíð eitt sagnorð, sigur Óli, tú skal bara seta "eg" frammanfyri. -Hygg her, her stendur: "Ole læser en bog", so er "læser" umsøgn og "Ole" er grundlið. Tú skalt seta ein bolla undir "læser" og ein kross undir "Ole".

-Hetta er kanska ikki so trupult, heldur Bárður. Men tað er gott, at tú hjálpir mær, Óli.

## Set kross í rætta puntin

| | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Spik eitur blubber á enskum | | |
| Umsøgnin er altíð eitt navnorð | | |
| Óli hevur danskt og enskt fyri til í morgin | | |
| Tey eta frikadellur til døgurða | | |
| Pápi borðreiðir | | |
| Mandy er og ferðast í Onglandi | | |
| Mandy er íslendsk | | |
| Mamma flysur epli | | |
| Í fjórða flokki hava tey bæði enskt og danskt | | |

# Hvat merkja hesir setningarnir?
# Set rætt tal á strikuna

**Dømi:**

Fyrradagin keypti mamma Bárð nýggjan bil. 2

1. Hann keypti nýggjan bil fyrradagin.
2. Mamma Bárð keypti nýggjan bil.
3. Tey keyptu nýggjan bil í gjár.

---

Tey eta døgurða á middegi. ____

1. Tey eta døgurða um kvøldið.
2. Tey eta døgurða klokkan tólv um dagin.
3. Døgurði teirra verður etin seinnapartin.

---

Enskt er nýggj lærugrein í fjórða flokki. ____

1. Í fjórða flokki fáa næmingarnir enskt.
2. Enskt er lærugrein í triðja flokki og heldur fram í fjórða.
3. Tað er stuttligt at hava enskt.

---

Fjórði flokkur sleppur heim klokkan 14.00 hvønn mánadag.

____

1. Fjórði flokkur sleppur heim hvønn dag klokkan tvey.
2. Hvønn mánadag hava næmingarnir í fjórða flokki frí klokkan tvey.
3. Tað er gott at fáa frí klokkan 14.00.

---

Bárður dugir væl at rokna, og Anna dugir væl at lesa. ____

1. Bárður er dugnaligur roknari, og Anna er dugnaligur lesari.
2. Bárður og Anna eru dugnaligir lesarar.
3. Hvørki Anna ella Bárður duga at rokna.

Anna sigur, at hon hevur lisið 24 bøkur í ár. ____

1. Anna er røsk at lesa.
2. Anna hevur lisið yvir tjúgu bøkur í ár.
3. Anna las 24 bøkur í gjár.

---

Fjórði flokkur hevur Lenu í donskum. ____

1. Fjórði flokkur hevur ikki fingið danskt enn.
2. Fjórða flokki dámar væl Lenu.
3. Lena undirvísir í donskum í 4. flokki.

---

Svimjing er á tímatalvuni hjá 4. flokki hvønn týsdag. ____

1. Fjórði flokkur svimur annanhvønn týsdag.
2. Fjórði flokkur fer at svimja hvønn týsdag.
3. Fjórði flokkur svimur saman við fimta.

---

Anna fer til Íslands at ferðast í summar. ____

1. Anna hevur ofta verið í Íslandi og ferðast.
2. Ísland er eitt gott land at ferðast í.
3. Í summar fer Anna til Íslands.

---

Bárður fer altíð í skúla við skúlabussinum. Bussurin steðgar beint við húsini hjá teimum.

____

1. Skúlabussurin steðgar tætt við húsini hjá Bárði og teimum.
2. Bárður fer sjáldan í skúla við skúlabussinum.
3. Bárður fer altíð í skúla til gongu.

# Ger eftir forskriftini




- Set ein kross í mittasta puntin
- Set ein kross í puntin, niðast til vinstru í fyrsta teigi
- Set ein kross í puntin næstovast til vinstru í fyrsta teigi
- Set ein kross í ovasta punt í næstuttasta teigi til høgru
- Set ein kross í næstniðasta punt í teiginum uttast til høgru